# Eykaaðalfundur í P/F Smyril Line

Boðað verður við hesum til eykaaðalfundar í P/F Smyril Line týsdagin tann 21. desembur 2004 kl. 15.00 á Hotel Føroyum við Oyggjavegin í Tórshavn við fylgjandi fundarskrá:

1. Val av fundarstjóra.
2. Viðtøkubroytingar - har ísettar verða grein 3 A og 3 B í viðtøkur felagins við hesum innihaldi:

**»§ 3A**

Stk. 1.
Í tíðarskeiðnum til 31. desembur 2005 hevur nevnd felagsins heimild til - í einum ella fleiri umførum - at hækka partapening felagsins við íalt upp til DKK 100 milliónum í nominellum virði. Hækking av partapeninginum kann heilt ella lutvíst fara fram í øðrum virðum enn reiðum peningi, herundir soleiðis, at felagið í sambandi við hækkingina av partapeninginum uttan viðurlag í partabrøvum tekur við slíkum øðrum virðum. Harumframt kann gjald av hækking fara fram við mótrokning.

Stk. 2.
Fyri hesa nýtekning av partapeningi verða annars at galda hesar ásetingar:

- Partapeningurin fær somu rættindi í felagnum sum verandi partapeningur;
- Partabrøvini skulu ljóða uppá íhendihavara og eru negotiabul;
- Eingi partabrøv hava framíhjárætt og partaeigararnir hava ikki skyldu at lata partabrøv síni innloysa
- Partabrøvini kunnu frítt verða seld uttan loyvi frá nevndini
- Heimilað er nevndini at avgerða at verandi partaeigarar ikki skulu hava forrætt til at tekna henda nýggja partapening.

  Ongar avmarkingar galda í fortekningsrættinum hjá nýggja partapeninginum við kapitalhækkingum í felagnum í framtíðini.

  Ger nevndin av at tekning skal fara fram uttan fortekningsrætt fyri verandi partaeigarar, er nevndini harumframt heimilað at avgerða sum eins treyt fyri at luttaka í tekning av hækkaða partapeninginum at hvør íleggjari skal tekna eina ávísa minstuupphædd í nýggjum partabrøvum
- Teknaður partapeningur er gjaldkomin samstundis sum teknað verður.
- Partabrøvini eru til støddar kr. 1.000,00 og multipla av hesum.
- Tekning fer fram til marknaðarvirði
- Nýggju partabrøvini fáa rætt til vinningsbýtið umframt onnur partaeigararættindi í felagnum í sama roknskaparári sum hækkingin av partapeninginum er skrásett.

**§ 3 B**

Stk. 1.
Í tíðarskeiðnum til 31. mars 2005 hevur nevnd felagsins heimild til at hækka partapening felagsins við ávísu upphæddini DKK 60 milliónum í nominellum virði. Hækking av partapeninginum kann heilt ella lutvíst fara fram í øðrum virðum enn reiðum peningi, herundir soleiðis, at felagið í sambandi við hækkingina av partapeninginum uttan viðurlag í partabrøvum tekur við slíkum øðrum virðum.

Stk. 2.
Fyri hesa nýtekning av partapeningi verða annars at galda hesar ásetingar:

- Hendan hækking av partapeninginum kann bert verða teknað saman ella av einum ella fleiri av hesum løgfrøðiligu persónum
  - Shetland Development Trust, Lervich
  - Tryggingarfelagið Føroyar Holding P/F, Tórshavn
  - Framtaksgrunnur Føroya, Tórshavn
  - Austfar hf, Ísland
  - Bygdastofnun, Ísland
- Partapeningurin fær somu rættindi í felagnum sum verandi partapeningur;
- Partabrøvini skulu ljóða uppá íhendihavara og eru negotiabul;
- Eingi partabrøv hava framíhjárætt og partaeigararnir hava ikki skyldu at lata partabrøv síni innloysa
- Partabrøvini kunnu frítt verða seld uttan loyvi frá nevndini
- Verandi partaeigarar skulu ikki hava forrætt til at tekna henda nýggja partapening. Ongar avmarkingar galda í fortekningsrættinum hjá nýggja partapeninginum við kapitalhækkingum í felagnum í framtíðini.
- Hvør íleggjari skal tekna fyri minst DKK 300.000 í nýggjum partabrøvum
- Tekningartíðarskeiðið er 3 dagar, at rokna frá innbjóðing er løgd fyri íleggjararnar at tekna nevnda partapeningin.
- Við yvirtekning verður hvør teknað upphædd lækkað niður til upphæddina DKK 60 milliónir pro-rata við støði í verandi partapeningsupphædd hjá teknandi íleggjara.
- Teknaður partapeningur er gjaldkomin tveir arbeiðsdagar eftir at tekningartíðarskeiðið er runnið.
- Partabrøvini eru til støddar kr. 1.000,00 og multipla av hesum.
- Tekning fer fram til kurs 100
- Nýggju partabrøvini fáa rætt til vinningsbýtið umframt onnur partaeigararættindi í felagnum í sama roknskaparári tá hækkingin av partapeninginum er skrásett.
- Kostnaðurin í sambandi við kapitalhækkingina, ið felagið skal bera, fer ikki uppum DKK 500.000,-, hetta íroknað skrásetingargjald, løgfrøðiligur kostnaður, lýsingarkostnaður v.m.«

Frávik er í ætlaðu nevndarheimildini í grein 3B gjørd í fortekningsrættinum hjá verandi partaeigarum, hetta tí verandi fíggjarliga støða felagsins kann krevja, at kapitalhækking verður framd við stuttum skoðbráði. Hvat viðvíkur kursinum í grein 3B, ið er ásettur til 100, so er til hetta at viðmerkja, at henda áseting er framd fyri best møguliga at royna at tryggja at teir til tekningar innboðnu taka av hesum boði, serstakliga havandi fíggjarligu støðu felagsins í huga.

Uppskotini til viðtøkubroytingar krevja serligan meiriluta og eru uppskotini tí í fullum líki endurgivin omanfyri.

Uppskotini til viðtøkubroytingar, saman við øðrum tilfari, liggja annars frammi á skrivstovu felagsins Yviri við Strond 35-37, 100 Tórshavn 8 dagar frammanundan aðalfundinum.

Til at greiða atkvøðu á aðalfundinum krevst, at partaeigarin í seinasta lagi 3 dagar frammanundan aðalfundin hevur prógvað sín atkvøðurætt á skrivstovu felagsins.

**Nevndin í**

**P/F Smyril Line**


HAVNAR BIO
☆ Tlf. 3119 56 ☆
www.bio.fo




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 07.12. | kl. $20^{00}$ | Týsdagin | 07.12. | kl. $22^{45}$ |
| Mikudagin | 08.12. | kl. $20^{00}$ | Mikudagin | 08.12. | kl. $22^{45}$ |
| Hósdagin | 09.12. | kl. $20^{00}$ | Hósdagin | 09.12. | kl. $22^{45}$ |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 07.12. | kl. $16^{00}$ | Týsdagin | 07.12. | kl. $18^{00}$ |
| Mikudagin | 08.12. | kl. $16^{00}$ | Mikudagin | 08.12. | kl. $18^{00}$ |
| Hósdagin | 09.12. | kl. $16^{00}$ | Hósdagin | 09.12. | kl. $18^{00}$ |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 07.12. | kl. $21^{15}$ | Mikudagin | 08.12. | kl. $21^{15}$ |
| Hósdagin | 09.12. | kl. $21^{15}$ | | | |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 07.12. | kl. $19^{00}$ | Mikudagin | 08.12. | kl. $19^{00}$ |
| Hósdagin | 09.12. | kl. $19^{00}$ | | | |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 07.12. | kl. $16^{45}$ | Mikudagin | 08.12. | kl. $16^{45}$ |
| Hósdagin | 09.12. | kl. $16^{45}$ | – Seinasta sýning – | | |

**KOMANDI FILMUR**




FRUMSÝNING Fríggjadagin 10. desember

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**